6. apríl 2004

**Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 4/2004**

Tíð: Mikudagin 31. mars 2004 kl. 13.00-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari (fór av fundinum, meðan pkt 10 varð viðgjørt)
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 3/2004 setursráðsfundi 19. februar 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fundurin við lestrarvegleiðarar á miðnámsskúlunum 23. mars 2004.** (J.nr. 0018-01323). Flestu skúlarnir sendu umboð til fundin. Semja um, at tiltakið var væleydnað. Áhugi frá skúlunum fyri at verða kunnaði leypandi. Deildirnar fylgja sjálvar upp. Skúlarnir settu fram uppskot um at kunningarfundir á skúlunum verða lagdir í november heldur enn um várið, so tað verður gjørt, áðrenn studentarnir velja lærugreinar í januar. Kunna allar árgangir, ikki bara 3. g. Ráðið tók undir við hesum.

4. **Menningarætlanin – framhald?** (J.nr. 0017-01332). *Fundarskjal: Uppskot frá MM, dagfest 29.3.04, 2 s.* Ætlanin er at arbeiða við at orða visjón og missión fyri Setrið, men hetta eigur at bíða til eftir valini í heyst. Semja um at setursráðið í samráði við megindeildirnar orðar eina stutta, ítøkiliga menningarætlan við raðfestingum fyri 2004 og 2005. Skal brúkast í arbeiðinum at gera fíggjarætlan og umsókn um játtan fyri 2005. MM ger uppskot og sendir setursráðnum til viðmerkingar, áðrenn tað verður sent megindeildunum til viðgerðar.

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Uppskot frá Náttúruvísindadeildini um uppíbygging í deildina í Nóatúni.** (J.nr. 0033-01335). *Fundarskjal: Brævfrá HPJ, dagfest 16.3.04,1 s.* Uppafturtøka av uppskoti um at leingja bygningin hjá NVD, sum kann innrættast við hølum til undirvísingarvirksemi. Ráðið samt um, at uppíbyggingaruppskotið er eitt gott hugskot, sum arbeiðast skal víðari við, evt. kunnu vit eisini víðka uppíbyggingaruppskotið, so tað eisini kann savna virksemið hjá SSD í hesum partinum av bygninginum. Skal takast við í menningarætlanina, sum arbeitt verður við nú.

6. **Lindbergs Hús. Serprísir og ókeypis gisting.** (J.nr. 0036-00342). Verandi prísir staðfestir. Deildirnar rinda av deildarrakstrinum fyri sínar gestir, Setursskrivstovan fyri gestir setursins. Rektarin tekur støðu í serligum førum.

7. **Nýggj próvbókarskipan á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. 0017-01203). AS kunnaði um nýggju skipanina, sum er á veg. Deildarskrivstovurnar fara í fyrsta umfari at hava atgongd til at leita í skipanini, seinni eisini skráseta í henni. Útskriving av Diploma Supplement er bygt inn í skipanina. Dáta úr gomlu próvbókini verða flutt yvir í nýggju skipanina. Verður klár til nýtslu innan summarfrítíðina.

8. **Fíggjarlógaruppskotið 2004.** (J.nr. 0015-01111). AS kunnaði um uppskotið, sum er lagt fyri Løgtingið. Uppskotið til játtan til setursraksturin er uppá 18.658 tkr, harav eru 100 tkr til námsferðarstuðul. Í mun til játtanina í 2003 er talan um eina skerjing uppá 827 tkr. ella 4,5 %. Uppskotið til løgujáttan er uppá 500 tkr, uppskotið til umvælingarjáttan er 400 tkr. AS ger lønarframrokningar við støði í dagførdum tølum frá deildunum og uppskot til býti av játtan. Formligt býti verður gjørt so skjótt fíggjarlógin er samtykt.

9. **Samsýning fyri metingar.** (J.nr. 0015-1010). *Fundarskjal: Uppskot til broytingar frá SSS, dagfest 31.3.04, 1 s.* Semja um at broyta tímatalið fyri metingar av størvum og framflytingum. Samtykt.

10. **Professarameting av Maluni Marnersdóttur.** (J.nr. 0021-01274). MM fór av fundinum undir viðgerðini av hesum málinum, JPJ leiddi fundin. *Fundarskjøl: Metingar frá Idar Stegane, professara, dagfest 16.2.04, 5 s., Jürg Glauser, professara, dagfest 2.3.04, 5 s., og Dagný Kristjansdóttur, professara, dagfest 21.3.04, 4 s.* Tilmælini frá metingarfólkunum siga greitt, at MM hevur professaraførleika. Vísandi til Reglur um vísindastørv á Fróðskaparsetri Føroya, samtyktar av setursráðnum 17.6.99, samtykti setursráðið tí einmælt at framflyta MM til professara frá dags dato. Hon fær samstundis persónligt professaraheiti. Skipað verður fyri almennari samkomu seinni í vár eftir avtalu við MM.

11. **Netsamstarvið og Internet-sambandið á Søgu- og Samfelagsdeildini.** (J.nr. 0038-01344). *Fundarskjal: Teldubræv frá JPJ, dagfest 24.3.04, 1 s.* JPJ greiddi frá málinum. Ráðið samt um at støðan als ikki kann góðtakast, ein loysn má fáast á málið beinanvegin. Heitt verður á SSD um saman við Kervi, netumsitaranum og

setursskrivaranum at gera uppskot til nøktandi loysn við neyvari kostnaðarmeting. Málið skal síðani leggjast fyri setursráðið til støðutakan.

12. **Ásetingar um notatskyldu í sambandi við próvtøku.** *Fundarskjal: Teldubrævfrá Magnusi Danielsen, dagfest 31.3.04, 1 s.* Brævið lisið upp á fundinum. Semja um at tulkingin hjá MD er røtt. Tey notat, sum próvdómari ger, meðan hann rættar skrivlig avrik og lurtar eftir munnligari próvtøku, hava til endamáls, at hann og lærarin aftan á próvdømingina eru førir fyri at gera tær viðmerkingar og tilmæli, sum eru neyðug, um kæra kemur uppá tal. Próvdómarin goymir viðmerkingarnar. MM svarar MD.

13. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundir á Søgu- og Samfelagsdeildini 3.2.04, 10.2.04 og 9.3.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundir á Føroyamálsdeildini 16.2.04 og 8.3.04.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
    c. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 2.3.04.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

**14. Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Øystein Skagseth, dr.scient, vísindaligan skrivara hjá Norðurlanda Ráðharraráðnum innan havveðurlagsfrøði, Bergen, sum próvdómara í *Innføring í Wavelets Transformum*, *Havfrøði fyri lívfrøðingar* og *Numerisk simulering.* At staðfesta.** (J.nr. 0026-00781). Staðfest.

**Kunningarmál:**

**15. NUAS (Nordiska Universitets Administratörsamarbetet) -ráðstevna í Bergen 9.-12.5.04 "Kvalitet i utdanninga sett frå ulike perspektiv".** (J.nr. 0014-01328).

**16. Mánaðarjavni ultimo desember 2003, 2. ískoytisskeið, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 17.917.100 kr = 92,4%** (J.nr. 0015-00910). **Mánaðarjavni ultimo januar 2004, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 1.203.600 kr.** (J.nr. 0015-01111).

**17. Fróðskaparsetrið hevur fingið bókina *Ravne-Visen, En Färøisk Folkesang (1850)* hjá Alexander Weihe til gávus frá Jan Benda í Rødovre.** (J.nr. 0037-01337). MM takkar vegna Setrið fyri fínu gávuna, sendir bókagávu. Heitt verður á Landsbókasavnið um at gera kassa at goyma bókina í. Bókin veður latin FMD í varðveitslu.

**18. Frágreiðingin: Utvärdering av grund- och forskarutbildning i etnologi vid svenska universitet och högskolor løgd fram. Högskoleverkets rapportserie 2004:7 R, 74 s. Jóan Pauli Joensen var formaður fyri nevndini, sum gjørdi evalueringina.**

**19. Rit send Fróðskaparsetrinum:**

**a. Ársskýrsla Orðabókar Háskólans fyrir 2003. Háskóli Íslands.**
**b. Internationalisering af de danske universiteteter. Rektorkollegiet.**
**c. 8 danske succeshistorier 2003-2004. Statens Teknisk-Videnskabelige Forskningsråd.**

**20. Ársfrágreiðingar og ársroknskapir 2003 sendir Fróðskaparsetrinum:**

**a. Menningarstovan**
**b. Føroya Sparikassi.**

Frágreiðing: Annika Sølvará